Álit

í

løgtingsmáli nr. 64/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um at byggja sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki (Hægri fíggjarkarm)

Landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg, hevur lagt málið fram 25. januar 2024, og eftir 1. viðgerð 13. februar 2024 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 15. februar 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýriskvinnuna í almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg, saman við Landsverki.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Longd byggitíð
Veðrið hevur verið sera vánaligt í nógv longri tíð enn vanligt. Í sambandi við arbeiðið at leggja fjarhitan í jørðina undir bygningin var tað ringa veðrið við til at steðga arbeiðinum í eina tíð, og hetta var dýrkandi fyri alla verkætlanina, tí byggiharrin slapp ikki í gongd til ætlaðu tíðina.

Indeks, meira/minni veitingar/eykaútreiðslur
Ein orsøk til, at indeksið ikki var nokk í hesari verkætlanini samanborið við t.d. Mýruna er, at jørðarbeiðið, ið oftani hevur váða við sær, tá ið tað kemur til kostnað, var partur av samlaðu upphæddini í verklagslógini, meðan hesin parturin var boðin út fyri seg á Mýruni, áðrenn verklagslógin var framløgd. Tað vísir seg, at tað serliga er jørðarbeiðið, sum er orsøk til, at pengar vanta í her.

Viðvíkjandi tilfarslistanum so vóru nakrir manglar, ið høvdu ein kostnað við sær.

Til spurningin, um nógvar broytingar vórðu gjørdar í verkætlanini, eftir at arbeiðið var byrjað, er upplýst fyri nevndini, at verkætlanin er búnað við tíðini, og harvið eru nøkur ynskir komin fram, ið høvdu smávegis broytingar við sær, meðan arbeiðið hevur staðið uppá. Til hetta er viðmerkt frá Almanna- og mentamálaráðnum, at tey høvdu ikki tikið støðu til nakrar broytingar; hóast ynskir vóru sett fram, so høvdu tey hildið fast við upprunaligu ætlanina.

Til spurningin um arbeiðið var steðgað upp, er upplýst fyri nevndini, at tað var tað ikki. Upplýst er fyri nevndini, at túnið verður asfalterað, og at tá ið Løgtingið hevur tikið undir við hækkingini av útreiðslukarminum, verða tól og innbúgv bíløgd.

Nevndin hevur eisini fingið upplýst, at Landsverk hevur gjørt uppskot til ein nýggjan leist viðvíkjandi uppgávu- og ábyrgdarbýtinum millum Almanna- og mentamálaráðið og Landsverk, og um hvørjar uppgávur hvør partur hevur í byggitilgongdini. Almanna- og mentamálaráðið hevur tikið undir við hesum leisti.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 22. februar 2024

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	